MENTAMÁLARÁÐIÐ
INNANHÝSIS

# Serstaka virðisløn landsins 2023

verður latin Biritu Mohr, sjónleikara

Birita Mohr legði saman við øðrum undangongufólkum lunnar undir yrkisleiklistina í Føroyum, tá tey settu á stovn yrkisleikbólkin Grímu.

Leikbólkurin Gríma lyfti sjónleikin í Føroyum á eitt yrkislistaligt støði og skapti eitt umhvørvi fyri yrkisleiklistina í Føroyum. Birita Mohr virkaði sum leikari, leikstjóri, undirvísari, høvundur, framleiðari og samskipari í leikbólkinum, eins og hon gav eitt megnar íkast sum kveikjari, undirvísari og leikstjóri í áhugafeløgunum kring landið.

Sum sjónleikari megnar Birita Mohr allar genrur; líka frá tí ekspressiva úttrykkinum til psykologiska realismu, har Birita á nemandi hátt lýsir tær heilt niðurtónaðu, inniligu kenslurnar í mannalyndinum.

Birita Mohr hevur havt týðandi leiklutir í eini langari røð av leikum, eitt nú í leikunum *Antigone* í Norðurlandahúsinum í 1989, *Glataðu Spælimenninir* í Norðurlandahúsinum í 1993, *Kirsuberjagarðurin* á Tjóðpalli Føroya í 2010 og *Reinsan* á Tjóðpalli Føroya í 2011.

Tað var serstakt at uppliva Biritu Mohr í høvuðsleiklutinum í sjónleikinum *Lear kongur* eftir William Shakespeare, sum leikbólkurin Det Ferösche Compagnie setti á pall í Sjónleikarhúsinum í Havn á sumri 2023.

Birita Mohr hevur sett varðar eftir seg á føroyska leiklistapallinum og fær fyri avrikini Serstøku virðisløn landsins 2023.

Sirið Stenberg, landsstýriskvinna
18. oktober 2023

Hoyvíksvegur 72 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
☎ +298 30 65 00 • 🖷 +298 30 65 55 • ✉ mmr@mmr.fo • www.mmr.fo